

## Pætur Zachariasen, forsangari í Boys in a Band, um 1. plássið:

"Vit høvdu ikki vant nakað serligt til kappingina," viðgongur Pætur. "Men nú eru vit eisini í so góðari venjing, at vit ikki mettu hetta vera neyðugt." Hóast teir áður høvdu tosað um at luttaka í GBOB aftur í ár, meldaðu dreingirnir seg ikki til kappingina fyrrenn tveir dagar áðrenn freistin var. "Vit taka tað bert sum eina uppliving, tað er í ár einki seriøst. Tí í løtuni hava vit so nógvar ymiskar bóltar í luftini."

Tá ið vit spyrja hann, um bólkurin ætlar sær at geva eina fløgu ella okkurt tílíkt út í næstum, svarar Pætur, at hann ikki rættiliga veit hetta. "Vit eru akkurát heimafturkomnir úr Íslandi, har vit hava spælt á Iceland Airwaves, sum er tann hippasti festivalurin, ið er. Fleiri av hinum bólkunum, sum spældu her, hava gjørt á tann hátt, at teir selja nakrar singuls og gera eina lp-plátu, ístaðin fyri at geva eina fløgu út. Eg veit ikki, um tað rætta fyri okkum er at geva eina fløgu út, men nú fáa vit at síggja..."


## Fólkatingsval 2007

Sum kunngjørt av ríkisumboðsmanninum verður fólkatingsval týsdagin 13. november 2007.

**Valt verður soleiðis:**

1. Fólk í Havn, Mjørkadali, Norðradali og Hoyvík, á Hvítanesi og Sundi velja í ítróttarhøllini á Hálsi.
2. Fólk á Argjum velja í róðrarneystinum á Arjum.
3. Fólk í Kaldbak og Kaldbaksbotni velja í skúlanum í Kaldbak.
4. Fólk í Kollafirði velja í skótahúsinum í Kollafirði.
5. Fólk í Kirkjubø, á Velbastað og í Syðradali velja í skúlanum á Velbastað.
6. Fólk í Heysti og Koltri velja í Bygdastovuni í Heysti.
7. Fólk í Nólsoy velja í felagshúsinum hjá Ungmanna-felagnum Royndini í Nólsoy.

Atkvøðugreiðslan verður millum kl. 9.00 og 20.00 og so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Tey, sum fyri sjúku ella øðrum orsøkum ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu boða frá á Snarskivuni, tlf. 30 20 10, til leygardagin 10. november 2007 kl. 18.00.

Samstundis verður sagt frá, at valkort til fólkatingsvalið verða send øllum teimum, ið standa á vallistanum. Um so er at valkortið ikki er komið áðrenn mánadagin 5. november 2007, orsakað av t.d. bústaðarflyting, skal boðast Snarskivuni frá hesum sum skjótast, tlf. 30 20 10.

Tórshavnar kommuna



FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# KUNNGERÐ

## um fólkatingsval í Fuglafjarðar kommunu

**Til veljarar til fólkatingsvalið 13. november 2007 í Fuglafjarðar kommunu.**

Vísandi til at fólkatingsval er útskrivað, so skal hervið verða kunngjørt, at atkvøðugreiðslan fer fram í býráðssalinum týsdagin tann 13. november 2007 fyri Fuglafjørð og Kambsdal og í Bønhúsinum á Hellunum fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 09.00 og 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

**Brævatkvøða:**
Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum **kl. 10.00 og 15.00** til og við fríggjadagin 09. november 2007. Tá seinasta freist fyri at greiða brævatkvøðu er leygardagin **10. november 2007**, so verður býráðsskrivstovan eisini opin nevnda dag millum kl. 13.00 og 17.00.

**Heimaval:**
Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima í seinasta lagi leygardagin 10. november 2007 við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 737700 ella 737701 í seinasta lagi leygardagin tann **10. november 2007 kl. 15.00.**

**Valkort:**
Valkort verða send veljarunum í kommununi við postinum, og um persónur, sum heldur seg hava valrætt, ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við býráðsskrivstovuna á telefon 737700 skjótast.

**Veljarar hava valkortið við sær til valborðið.**

***Fuglafjørður, tann 29. oktober 2007***



# Telefonbókin 2008



Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2008 er mikudagin 7. november 2007

**Í mars 2008 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.**

### Hvítu Síður

Mikudagin 7. november 2007 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu Síðurnar í Telefonbókini fyri 2008 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu Síðurnar er á síðu 563 í Telefonbókini 2007, og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu Síðum. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.000,00 (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku. Fyri búmerki í litum er prísurin kr. 3.000,00 fyri hvørja upptøku.

### Gulu Síður

Mikudagin 7. november 2007 er seinasta freist at boða frá av nýggjum, um upptøka ynskist í Gulu Síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ........................................ kr. 900,00
(B) Innramming............................................ kr. 1.000,00
(E) Grafisk lýsing fyri mm (min. 30 mm) ....... kr. 30,00
(Sí dømi á s. 565 í Telefonbókini 2007)

**Litlýsingar**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 600,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.400,00. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu Síður er á síðu 564 í Telefonbókini 2007, og skal sendast til: Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu Síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.ft.fo www.nummar.fo info@nummar.fo www.gulu.fo info@gulu.fo

FØROYA TELE